# Fólkanøvn í Sandoyar sýslu 1801

*Eftir Jákup í Jákupsstovu.*

Henda grein er framhald av grein í seinasta Fróðskaparriti, har fólkanøvn í Suðuroyar sýslu 1801 vórðu viðgjørd.

Hesa ferð eru tað nøvnini í Sandoyar sýslu, ið viðgjørd verða. Viðgerðarháttur og heimildir eru tey somu, sum nevnd vórðu í fyrra riti. Tó er um garðanøvn (býlingar) at siga, at hesi eru til skjals í upprunaliga manntalslistanum úr Suðuroy, og vórðu tey tí tilskilað í fyrru grein við teirri í manntalslistanum nýttu stavseting. Í tilsvarandi manntalslista úr Sandoy eru eingi nøvn á býlingum, húsum ella gørðum, men í avriti, sum Anton Degn skjalavørður hevur skrivað, eru nøkur, og tað eru tey sum í hesi grein eru tilskilað við teirri har nýttu stavseting. Men fólkanøvnini eru øll samsvarandi við upprunaliga manntalslistan frá 1801.

Tá búðu í Sandoyar sýslu sløk 9 % av Føroya fólki, nevniliga 466 av 5.265 íbúgvum landsins:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1) | Sands Sogn | | 168 |
| 2) | Skaaleviig Sogn | | 107 |
| 3) | Huuseviig Sogn: | | |
| | Huuseviig | 54 | |
| | Dahl | 49 | |
| | Skarvenæs | 18 | 121 |
| 4) | Skuøe Sogn | | 57 |
| 5) | Store Dimon Sogn | | 13 |
| | Altsaa i Sandøe Præstegield tilsammen | = | 466 |

## *Sandur*

Præstegaarden, Trødum, Sandegaard, i Hodne, Aaergaard, Nordre Soyle, á Høj, á Reyni, under Reyni Skaale kaldet, under Reyn, Søndre Køjte, op under Reyn, Skardsgaard, Klettum, under Klettum Buen kaldet, under Klettum, under Klettum Skaale kaldet. Tilsamans 27 húski, 168 fólk.

*Kvinnur:*

2 Amalia Elisabeth
7 Anna
2 Anna Cathrine
1 Anna Maria
2 Bille
1 Birgithe Christiane
1 Birthe
6 Cathrine
2 Christen
1 Christine Maria
1 Ellen
10 Elsebeth
1 Friderica Maria
1 Gundil
1 Guren
4 Kristen
2 Lisbeth
5 Malene
13 Maren
1 Maren Kristine
2 Maria
2 Sara
1 Sidsel
1 Sigga
1 Sophia Hedevig
13 Sunnevad
1 Susanna

85 kvinnur á Sandi 1801

*Menn:*

1 Andreas
1 Blasius
1 Christian
3 Clemen
3 Daniel
2 David
1 Guttorm
1 Haldan
3 Hans
1 Henrik
4 Jacob
1 Jacob Eisenberg
1 Jacob Michael
3 Jens
16 Joen
1 Johan Michael
5 Johannes
1 Magnus
3 Mikkel
1 Morthen
1 Niclas
1 Niels
6 Ole
5 Peder
5 Poul
3 Rasmus
1 Sakarias
2 Samuel
3 Simon
3 Thomas

83 menn á Sandi 1801

## *Skálavík*

Dalsgaard, á Trø, under Haugebrekke, Indre-Dal, á Øre det vestre, á Øre det østre, á Hamri. Tilsamans 22 húski, 107 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 2 Adda | 1 Antonius |
| 5 Anna | 1 Clemen |
| 1 Anna Cathrine | 2 Daniel |
| 1 Anna Sophia | 7 Hans |
| 2 Cathrine | 3 Jacob |
| 4 Elsebeth | 4 Jens |
| 3 Kristen | 5 Joen |
| 3 Magge | 3 Johannes |
| 6 Malene | 1 Lucas |
| 7 Maren | 1 Lyder |
| 1 Maria | 2 Magnus |
| 1 Marianna | 1 Melchior |
| 2 Rachel | 1 Mikkel |
| 1 Sidsel | 1 Morthen |
| 1 Sophia | 5 Niclas |
| 8 Sunnevad | 2 Nicodemus |
| 3 Susanna | 1 Nicolai |
| | 4 Ole |
| 51 kvinnur í Skálavík 1801 | 2 Peder |
| | 2 Poul |
| | 1 Samuel |
| | 1 Simon |
| | 1 Sivert |
| | 2 Thomas |
| | 2 Trond |
| | |
| | 56 menn í Skálavík 1801 |

## *Húsavík*

á Bøe, ved Aa, Skumpetoft, Lille Stove, á Loft, á Grande, á Breyt, á Flette. Tilsamans 13 húski, 54 fólk.

*Kvinnur:*

5 Anna
1 Bille
1 Cathrine
2 Elsebeth
1 Johanne
3 Malene
3 Maren
1 Maria
4 Sunnevad
4 Susanna

25 kvinnur í Húsavík 1801

*Menn:*

2 Antonius
1 Clemen
1 Daniel
1 David
3 Gregers
1 Gutte
1 Hans
2 Jacob
1 Jens
4 Joen
1 Johannes
2 Lucas
1 Mikkel
3 Ole
2 Peder
1 Poul
1 Samuel
1 Thomas

29 menn í Húsavík 1801

## *Dalur*

Tilsamans 12 húski, 49 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 6 Anna | 1 Antonius |
| 3 Bille | 2 Christopher |
| 6 Cathrine | 2 Erik |
| 1 Johanne | 1 Henrik |
| 2 Maren | 1 Jacob |
| 1 Maria | 1 Joen |
| 1 Rachel | 2 Johannes |
| 1 Sidsel | 1 Lauritz |
| 2 Sunnevad | 1 Magnus |
| 2 Susanna | 1 Morthen |
| | 1 Niclas |
| 25 kvinnur í Dali 1801 | 8 Ole |
| | 1 Rasmus |
| | 1 Samuel |
| | |
| | 24 menn í Dali 1801 |

## *Skarvanes*

Tilsamans 3 húski, 18 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 1 Anna | 2 Daniel |
| 1 Bille | 1 Guttorm |
| 1 Cathrine | 1 Hans |
| 1 Ellen | 1 Joen |
| 1 Elsebeth | 1 Ole |
| 1 Lisbeth | 1 Samuel |
| 1 Malene | |
| 1 Sigga | 7 menn á Skarvanesi 1801 |
| 3 Sunnevad | |
| | |
| 11 kvinnur á Skarvanesi 1801 | |

## *Skúvoy*

Tilsamans 13 húski, 57 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 1 Adda | 1 Anders |
| 8 Anna | 2 Daniel |
| 1 Anna Cathrine | 1 Erik |
| 1 Cathrine | 5 Hans |
| 1 Christin | 1 Henrik |
| 2 Ellen | 1 Jacob |
| 1 Elsebeth | 1 Jens |
| 1 Lisbeth Maria | 7 Joen |
| 3 Malene | 1 Johannes |
| 3 Maren | 3 Ole |
| 1 Sidsel | 5 Thomas |
| 1 Sigga | |
| 5 Sunnevad | 28 menn í Skúvoy 1801 |
| 29 kvinnur í Skúvoy 1801 | |

## *Dímun*

Tilsamans 1 húski, 13 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 2 Anna | 1 Hans |
| 2 Bille | 1 Johannes |
| 1 Elsebeth | 1 Ole |
| 1 Johanne | 1 Poul |
| 1 Malene | |
| 2 Maren | 4 menn í Dímun 1801 |
| 9 kvinnur í Dímun 1801 | |

*Kvinnunøvn í Sandoyar sýslu 1801*

3 *Adda* eru 78 ára einkja í Skúvoy, 31 ára ógift bóndasystir undir Hagabrekku og 9 ára bóndadóttir á Hamri í Skálavík.

2 *Amalia Elisabeth* eru báðar í prestagarðinum heima á Sandi: Onnur er 19 ára bróðurdóttir prestsins, og hin er elsta prestadóttirin, 12 ára gomul.

34 *Anna* eru í øllum bygdum í Sandoyar sýslu í øllum aldri upp í 82 ár.

4 *Anna Cathrine.* Tvær eru á Sandi: Hin eldra, 32 ár, tænir í prestagarðinum, og hin yngra, 20 ár, tænir hjá kongsbónda-einkjuni á Klettum. Í Skúvoy er 43 ára bóndakona og í Skálavík er 4 ára bóndadóttir.

1 *Anna Maria* er 5 ára faðirloysingur uppi undir Reyni á Sandi.

1 *Anna Sophia* er 7 ára yngsta dóttir bóndans sála í Dalsgarði í Skálavík.

9 *Bille* eru í øllum bygdum uttan Skálavík og Skúvoy. Aldur 6—82 ár.

1 *Birgithe Christiane* er 9 ára prestadóttir á Sandi.

1 *Birthe* er 50 ára systir látna bóndans á Áargarði heima á Sandi.

17 *Cathrine* eru í øllum bygdum uttan í Dímun í øllum aldri upp til 82 ár. Har aftrat er C. seinna navn í samanseting Anna C.

*Christiane* er bert í samanseting Birgithe C.

3 *Christin.* Elsta C. er 45 ára kona tilstundandi bónda í Skúvoy. Hinar báðar, skrivaðar Christen, eru heima á Sandi: 29 ára tænastukvinna á Sondum og 20 ára elsta dóttir á Áargarði; sí eisini Kristen.

1 *Christine Maria* er 6 ára prestadóttir heima á Sandi.

*Elisabeth* er bert í samanseting Amalia E.; sí eisini Lisbeth.

4 *Ellen* eru tvær í Skúvoy, 36 og 32 ár. Á Skarvanesi er 58 ára bóndakona, og heima á Sandi er 22 ára dóttir bóndans í Horni.

19 *Elsebeth* eru í øllum bygdum uttan í Dali. Aldur 4—74 ár.

1 *Friderica Maria* Eisenberg er 47 ára bónda-einkja á Skarðsgarði heima á Sandi.

1 *Gundil,* 29 ár, tænir í prestagarðinum heima á Sandi.

1 *Guren* er 3 ára bóndadóttir í Trøðum heima á Sandi.

*Hedevig* er bert í samanseting Sophia H.

3 *Johanne* eru 83 ára húsmanskona í Dali, 40 ára bónda-einkja í Dímun og 10 ára »fattig Fosterdatter« á Breyt í Húsavík.

7 *Kristin* eru allar á Sandi og í Skálavík. Á Sandi: 80 ára bónda-einkja á Reyni og 46 ára ógifta dóttir hennara. 59 ára kona uppsitarans á Sondum eitur K., og í sama húsi er onnur kvinna, sum er skrivað Christen eins og bóndadóttirin á Áargarði, meðan 9 ára faðirloysingur heima á Sandi er skrivað Kristen. Tær tríggjar K. í Skálavík eru allar ógiftar, 29, 25 og 14 ár. Ein teirra er skrivað Kristin.

*Kristine* er bert í samansetingum Maren Kristine og Christine Maria.

3 *Lisbeth* eru 75 ára bónda-einkja uppi undir Reyni og 25 ára bóndadóttir í Trøðum heima á Sandi. Triðja er 19 ára bóndadóttir á Skarvanesi.

1 *Lisbeth Maria* er ársgomul bóndadóttir í Skúvoy.

3 *Magge* eru 38 ára tænastukvinna í Dalsgarði, 37 ára bóndakona inni í Dali og 28 ára húsmansdóttir undir Hagabrekku, allar í Skálavík.

19 *Malene* eru í øllum bygdum uttan í Dali. Aldur 1—80 ár.

30 *Maren* eru í øllum bygdum uttan á Skarvanesi. Aldur 4—84 ár.

1 *Maren Kristine* Eisenberg er 44 ára prestakona heima á Sandi.

5 *Maria.* Elsta M. er 77 ára einkja á Granda í Húsavík. Hinar eru allar ungar gentur: 17 ára stjúkdóttir í Dalsgarði í Skálavík, 14 ára tænastugenta í Dali, 7 ára bóndadóttir og ársgomul abbadóttir Mortans bónda í Trøðum

heima á Sandi. Har aftrat er M. seinna navn í samansetingum: Anna M., Christine M., Friderica M. og Lisbeth M.

1 *Marianna* er 3 ára bóndadóttir í Innaradali í Skálavík.

3 *Rachel* eru 64 ára bóndakona í Dali, 32 ára ógifta systir Óla bónda undir Hagabrekku og 25 ára tænastukvinna í Dalsgarði í Skálavík.

2 *Sara* eru 61 ára og 49 ára matmøður heima á Sandi.

4 *Sidsel.* Elsta S. er ein av teimum seks íbúgvunum í prestagarðinum heima á Sandi, sum presturin Peder Hentze skýrir: »Gamle, nu ubrugelige Tienestefolk fra Formænds Tiid; nyde Ophold paa Gaarden til deres Død.« Tey eru øll 6 millum 68 og 82 ár. Sjálv er S. 76 ár. Hinar S. eru 53 ára bóndakona í Skúvoy, 43 ára bóndakona í Skálavík og 2 ára smágenta í Dali.

3 *Sigga* eru allar farnar um hálvthundrað: 74 ára gomul genta í Skúvoy, 72 ára einkja á Skarvanesi og 50 ára sýslumanskona heima á Sandi.

1 *Sophia* er 2 ára smágenta í Skálavík, og har aftrat er S. seinna navn í samanseting Anna S. og fyrra navn í samanseting S. Hedevig.

1 *Sophia* Hedevig er 4 ára prestadóttir heima á Sandi.

35 *Sunnevad* eru í øllum bygdum í Sandoyar sýslu uttan í Dímun. Aldur 5—85 ár.

10 *Susanna* eru í øllum bygdum í Sandoynni uttan á Skarvanesi, men ikki í Skúvoy ella í Dímun. Aldur 9—45 ár.

235 kvinnur í Sandoyar sýslu 1801.

## *Mannanøvn í Sandoyar sýslu 1801*

1 *Anders* er 10 ára drongur í Skúvoy.

1 *Andreas,* 68 ár, er yngstur av teimum seks íbúgvunum í prestagarðinum heima á Sandi, sum presturin skýrir: »Gamle, nu ubrugelige Tienestefolk fra Formænds Tiid; nyde Ophold paa Gaarden til deres Død.«

4 *Antonius* eru 79 ára faðir bóndans á Breyt og 59 ára óðalsbóndi í Skumputoft í Húsavík, 14 ára drongur í Dali og 2 ára drongur í Skálavík.

1 *Blasius* er ársgamalt dreingjabarn á Heyggi heima á Sandi.

1 *Christian* er 52 ára bróðir látna bóndans á Skarðsgarði heima á Sandi.

2 *Christopher* eru 35 ára ógiftur bóndasonur og 64 ára einkju- og einbýlismaður, báðir í Dali.

5 *Clemen.* Elstur er 52 ára óðalsbóndi og sýslumaður C. Olesen heima á Sandi, og har í bygdini eru eisini 18 ára sonur látna bóndans á Heyggi og 13 ára sonur látna bóndans á Skarðsgarði. Hinir báðir eru 41 ára óðalsbóndi á Eystaru Oyri í Skálavík og 24 ára ógiftur svágur bóndans í Lítlu Stovu í Húsavík.

10 *Daniel* eru í øllum bygdum uttan í Dali og í Dímun. Aldur 3—86 ár.

3 *David* eru 56 ára kongsbóndi í Horni og 25 ára ógiftur húskallur í Trøðum heima á Sandi og 53 ára húsmaður í Húsavík.

*Eisenberg* er bert í samanseting Jacob E.

3 *Erik* eru 70 ára óðalsbóndi og 9 ára abbasonur hansara í Dali og 20 ára bóndasonur í Skúvoy.

3 *Gregers* eru allir í Húsavík: 53 ára versonur og 9 ára abbasonur bóndans við Á og 12 ára sonur bóndans á Bø.

1 *Gutte* er 50 ára húsmaður á Breyt í Húsavík.

2 *Guttorm* eru 65 ára kongsbóndi á Skarvanesi og 10 ára drongur heima á Sandi.

1 *Haldan* er 89 ára gamalmenni heima á Sandi. Hann og konan Billa búgva tveyeini í húsi »fattige og sengeliggende; nyde Almisse.«

18 *Hans* eru í øllum bygdum uttan í Dali. Aldur 11—68 ár.

3 *Henrik* eru 35 ára Dalbingur, 27 ára bóndi í Skúvoy og 15 ára húskallur á Sandi.

11 *Jacob* eru í øllum bygdum uttan á Skarvanesi og í Dímun. Aldur 6—72 ár.

1 *Jacob Eisenberg* er 7 ára prestasonur heima á Sandi. Eisenberg er eftirnavn móðurinnar, men bara Jacob hevur

hetta sum seinna fornavn ella millumnavn, hóast øll seks systkini bera tvey fornøvn.

1 *Jacob Michael*, 15 ára sonur bónda-einkjunnar á Skarðsgarði, var hann ið seinni fekk sær eftirnavnið Widerøe.

9 *Jens* eru fýra í Skálavík: 82 ára einkju- og einbýlismaður »Huusmand uden Jord og Almisselem«, 55 ára húskallur í Dalsgarði, 44 ára óðalsbóndi undir Hagabrekku og 24 ára stjúksonur Hanusar bónda undir Hagabrekku. Í Húsavík er 33 ára bóndasonur á Lofti. Í Skúvoy er 28 ára bóndasonur og á Sandi eru tríggir, allir yngri enn 15 ár: Tveir hálvbrøður á Klettum og ein sonur Mikkjals bónda sála á Skarðsgarði.

34 *Joen*, vanligasta mansnavn í Sandoyar sýslu 1801, er í øllum bygdum uttan Dímun. Aldur 1—90 ár.

1 *Johan Michael* er 15 ára prestasonur heima á Sandi.

13 *Johannes* eru í øllum bygdum uttan á Skarvanesi. Aldur 8—71 ár.

1 *Lauritz* er 23 ára ógiftur húskallur í Dali.

3 *Lucas* eru tveir 53 og 41 ára óðalsbøndur í Húsavík og triði er 40 ára bróðir Óla bónda undir Hagabrekku í Skálavík.

1 *Lyder* er 72 ára húsmaður við jørð í Skálavík.

4 *Magnus* eru 74 ára einkjumaður og 13 ára abbasonur hansara í Skálavík, 46 ára giftur húsmanssonur í Dali og 13 ára sonur Mortans bónda í Trøðum á Sandi.

1 *Melchior* er 11 ára bóndasonur á Hamri í Skálavík.

*Michael* er bert í samansetingum Jacob M. og Johan M.

5 *Mikkel* eru tveir 52 ára húsmenn við jørð heima á Sandi, og har á Klettum er 25 ára Mikkjal »Broder og Tiener« hjá bónda-einkjuni. Í Skálavík er 40 ára versonur undir Hagabrekku, og í Húsavík er 32 ára bóndasonur á Lofti.

3 *Morthen* eru 66 ára kongsbóndi í Trøðum á Sandi, 33 ára húskallur í Dali og ársgamal bóndasonur í Skálavík.

7 *Niclas* eru 75 ára uppgávumaður (Fledføring) á Sondum heima á Sandi og 71 ára óðalsbóndi í Dali. Hinir fimm eru allir í Skálavík. Aldur 14—79 ár.

2 *Nicodemus* eru 79 ára óðalsbóndi á Hamri og 7 ára bóndasonur undir Hagabrekku, báðir í Skálavík.

1 *Nicolai* er 67 ára óðalsbóndi í Skálavík.

1 *Niels* er 6 ára bóndasonur undir Skarði heima á Sandi.

26 *Ole* eru í øllum bygdum og í øllum aldri upp til 91 ár.

9 *Peder.* Fimm eru á Sandi: 69 ára húsbóndi í Skálanum og 4 ára abbasonur hansara, 48 ára Sandoyar prestur, 16 ára bóndasonur í Trøðum og 2 ára bóndasonur á Klettum. Í Skálavík eru tveir: 53 ára kongsbóndi á Trøð og 31 ára tilstundandi bóndi. Og í Húsavík eru tveir: 72 ára haldbóndi og 15 ára abbasonur hansara á Bø.

9 *Poul* eru fimm á Sandi: 36 ára húsbóndi á Heyggi, 32 ára versonur bóndans í Norðaru Soylu, 28 ára sonur og 13 ára fostursonur uppsitarans á náðinsgarðinum og 25 ára sonur húsbóndans í Skálanum. Í Skálavík eru tveir 14—20 ára bóndasynir ávikavist í Dalsgarði og á Trøð. Í Húsavík er 75 ára óðalsbóndi við Á, og í Dímun er 11 ára bóndasonur.

4 *Rasmus* eru tríggir á Sandi: 79 ára haldbóndi og 23 ára abbasonur hansara í Horni og 14 ára sonur á Áargarði. Í Dali er 38 ára ógiftur bóndasonur.

1 *Sakarias* er 61 ára uppsitari á náðinsgarðinum heima á Sandi.

6 *Samuel* eru spjaddir í øllum bygdum í Sandoynni, men eru ikki í Skúvoy og í Dímun. Elstir eru 65 ára húsmaður við jørð undir Hagabrekku í Skálavík, 50 ára ognarleysur bønamaður á Fløtti í Húsavík, 40 ára húskallur í Dali og 25 ára bóndasonur á Skarvanesi. Á Sandi eru ein 12 ára bóndasonur og ein 10 ára húskallur (Tienestedreng).

4 *Simon* eru tríggir á Sandi: 74 ára »ubrugelige Tienestefolk fra Formænds Tiid« á prestagarðinum, 22 ára húskallur á náðinsgarðinum og 8 ára óskilgitin abbasonur Mortans bónda í Trøðum. Í Skálavík er 60 ára giftur bønamaður.

1 *Sivert* er 75 ára einkjumaður, húsmaður við einum sindri av jørð í Skálavík.

11 *Thomas* eru 55 ára bróðir bóndans í Horni, 14 ára systur-

sonur hansara og ein 46 ára húsbóndi undir Klettum heima á Sandi. Í Skálavík eru 44 ára óðalsbóndi á Hamri og 19 ára húskallur á Trøð. Í Húsavík er 75 ára óðalsbóndi á Lofti. Hinir fimm eru allir í Skúvoy. Aldur 1—76 ár.

2 *Trond,* báðir í Skálavík: 27 ára bóndasonur á Trøð og 5 ára bóndasonur á Eystaru Oyri.

231 menn í Sandoyar sýslu 1801.

## *Eftirnøvn í Sandoyar sýslu 1801*

2 *Adams-* eru 64 ára einkju- og einbýlismaður í Dali og 59 ára húsmaður heima á Sandi. (Ádam er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

1 *Anders-* er 41 ára giftur bønamaður í Skúvoy. Hann er faðir at einnevnda Anders í Sandoyar sýslu.

7 *Antonius-* eru í somu bygdum sum fornavnið A.

*Arge,* sí Jensen Arge.

1 *Augustinus-.* Anna Augustinidatter, 66 ára matmóðir í Búðini undir Klettum á Sandi, er einasta sum ber A.-eftirnavnið, og sum fornavn er Augustinus ikki til í Sandoyar sýslu 1801.

2 *Benedits-.* 76 ára Sidsel er ein av teimum seks »gamle, nu ubrugelige Tienestefolk fra Formænds Tiid; nyde Ophold paa Gaarden til deres Død« í prestagarðinum í Todnesi, og hin er 58 ára matmóðir í Skálanum undir Klettum heima á Sandi. (Benedit er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

4 *Blasius-* eru 44 ára óðalsbóndi í Skálavík og tríggjar Blasiidøtur, ein í Dali og tvær á Sandi, 48, 40 og 35 ár. Henda yngsta eigur Blasius, sum var einnevndur í Sandoyar sýslu 1801.

3 *Christians-* eru 54 ára einkja í Dali, 30 ára genta á Trøð í Skálavík og ársgomul abbadóttir bóndans í Trøðum heima á Sandi.

16 *Clemens-* eru ellivu heima á Sandi í aldri 4—81 ár. Fýra eru í Skálavík, øll børn bóndans á Eystaru Oyri, og í Skúvoy er 76 ára óðalsbóndi sum »har Thorshavns Kirkejord i Fæste«.

11 *Daniels-* eru í somu bygdum sum fornavnið D.

8 *Davids-* eru haldbóndin í Horni og trý abbabørn hansara á Sandi, trý børn einnevnda Dáva í Húsavík og ein 19 ára genta á Dímunargarði.

1 *Diones-* er 14 ára systursonur Dáva bónda í Horni heima á Sandi. (Djóni er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

1 *Eidens-* er 66 ára húsmóðir heima á Sandi. (Eyðun er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

2 *Eisenberg* eru 47 ára bónda-einkja á Skarðsgarði og 44 ára prestakonan í Todnesi heima á Sandi.

7 *Eriks-* eru 70 ára óðalsbóndi og 38 ára dóttir hansara í Dali, tveir kongsbøndur í Skúvoy, 50 og 47 ár, ein 44 ára húsmóðir í Skálavík og tvey tilkomin børn látna bóndans undir Reyni heima á Sandi.

1 *Gotfreds-* er 20 ára genta á Klettum heima á Sandi. (Gotfred er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

6 *Gregers-* eru 72 ára haldbóndin á Bø, 53 ára versonur bóndans við Á og trý børn hansara í Húsavík og 71 ára óðalsbóndi í Dali.

4 *Guttes-* eru tvey 19 og 12 ára børn hins einnevnda Gutta í Húsavík, ein 14 ára fosturdóttir Jógvans bónda á Skarvanesi og ein 10 ára drongur í Norðaru Soylu heima á Sandi.

4 *Guttorms-* eru tvær 19 og 24 ára døtur og ein 14 ára sonur Guttorms bónda á Skarvanesi og ein 22 ára húskallur á Sondum heima á Sandi.

41 *Hans-* eru í øllum bygdum og í øllum aldri 1—82 ár.

1 *Hansen Koyte* er 69 ára Jógvan bóndi heima á Sandi.

5 *Henriks-* eru í somu bygdum sum H.-fornavnið, tó ikki í Skúvoy.

8 *Hentze* eru 48 ára Sandoyar prestur, seks børn hansara,

4—15 ár, og ein 19 ára bróðurdóttir prests. Øll búgva tey í Todnesi, har prestur býr sjálvur 21.

1 *Hermands-* er 48 ára bóndakona í Skumputoft í Húsavík. (H.-navnið er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).

*Høy*, sí Joensen Høy.

17 *Jacobs-* eru í somu bygdum sum J.-fornavnið, tó ikki í Skúvoy.

8 *Jens-* eru í somu bygdum sum J. fornavnið, tó ikki í Húsavík.

1 *Jensen Arge* er 55 ára húskallur í Dalsgarði í Skálavík.

73 *Joens-* eru í øllum bygdum uttan í Dímun og er vanligasta eftirnavn í Sandoyar sýslu 1801.

1 *Joensen Høy* er 33 ára Jógvan á Heyggi heima á Sandi.

25 *Johannes-* eru í somu bygdum sum fornavnið J., tó ikki í Húsavík og í Dímun.

1 *Justinus*-datter skrivast 41 ára bónda-einkja heima á Sandi. (Justinus er ikki til sum mansnavn í Sandoyar sýslu 1801).

*Koyte*, sí Hansen Koyte.

1 *Lauritz*-datter skrivast 54 ára kona í Dali, og har er somuleiðis einnevndi Lauritz í Sandoyar sýslu 1801.

8 *Lucas-* eru í Húsavík og í Skálavík eins og fornavnið, og har aftrat í Dímun. Aldur 3—77 ár.

1 *Lyders-* er 29 ára sonur einnevnda L. í Skálavík.

13 *Magnus-* eru í somu bygdum sum fornavnið M., og har aftrat »en fattig Fosterdatter« á Breyt í Húsavík.

26 *Mikkels-* eru eins og fornavnið Mikkjal á Sandi og í Skálavík, tó ikki í Húsavík; men í Dali, í Skúvoy og í Dímun er M.- navnið bara sum eftirnavn.

10 *Morthens-* eru 7 børn Mortans bónda í Trøðum, 90 ára abbi teirra, ein 68 ára húskallur í Todnesi heima á Sandi og ein 80 ára einkja í Skálavík.

3 *Niclas-* eru øll í Skálavík, 37, 79 og 82 ár.

3 *Nicodemus-* eru eini 29—33 ára systkin á Hamri í Skálavík og ein 38 ára bóndakona í Dali.

3 *Nicolai-* eru øll í Skálavík, 18, 25 og 31 ár.
2 *Niels-* eru 39 ára húsmóðir á Granda í Húsavík og 32 ára bóndakona á Skarvanesi.
43 *Oles-* eru í øllum bygdum uttan í Dímun og í øllum aldri 1—83 ár.
15 *Peders-* eru í somu bygdum sum fornavnið, 1—75 ár.
1 *Philippus-*. 64 ára kongsbóndi á Skarvanesi ber einsamallur eftirnavnið Philippussen, og sum fornavn er P.-navnið ikki til í Sandoyar sýslu 1801.
15 *Pouls-* eru í somu bygdum sum fornavnið og har aftrat ein á Skarvanesi.
6 *Rasmus-* eru í somu bygdum sum fornavnið. Aldur 45—68 ár.
3 *Sakarias-* eru øll børn hins einnevnda Sakaris heima á Sandi.
10 *Samuels-* eru í somu bygdum sum fornavnið, tó ikki heima á Sandi.
8 *Simons-* eru í øllum bygdum uttan í Dali.
4 *Siverts-* eru øll í Skálavík, øll ógift, og eingin yngri enn 34 ár.
1 *Sørens-* er 86 ára óðalsbóndi í Skúvoy. (Sørin er ikki til sum fornavn í Sandoyar sýslu 1801).
20 *Thomas-* eru í somu bygdum sum fornavnið og har aftrat ein í Dímun. Aldur 1—82 ár.
7 *Trond(e)s-* eru fýra ógift systkin á tríati/fjøruti ára aldri undir Hagabrekku í Skálavík, tvær 45—53 ára konur í Skúvoy og 48 ára móðir hins 5 ára Trónd á Eystaru Oyri í Skálavík.
466 fólk í Sandoyar sýslu 1801.

4. talva: *Kvinnunøvn í Sandoyar sýslu 1801*

| | Sandur | Skálavík | Húsavík (Húsavíkar sókn) | Dalur (Húsavíkar sókn) | Skarvanes (Húsavíkar sókn) | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Adda | | 2 | | | | 1 | | 3 |
| Amalia Elisabeth | 2 | | | | | | | 2 |
| Anna | 7 | 5 | 5 | 6 | 1 | 8 | 2 | 34 |
| Anna Cathrine | 2 | 1 | | | | 1 | | 4 |
| Anna Maria | 1 | | | | | | | 1 |
| Anna Sophia | | 1 | | | | | | 1 |
| Bille | 2 | | 1 | 3 | 1 | | 2 | 9 |
| Birgithe Christiane | 1 | | | | | | | 1 |
| Birthe | 1 | | | | | | | 1 |
| Cathrine | 6 | 2 | 1 | 6 | 1 | 1 | | 17 |
| Christin | 2 | | | | | 1 | | 3 |
| Christine Maria | 1 | | | | | | | 1 |
| Ellen | 1 | | | | 1 | 2 | | 4 |
| Elsebeth | 10 | 4 | 2 | | 1 | 1 | 1 | 19 |
| Friderica Maria | 1 | | | | | | | 1 |
| Gundil | 1 | | | | | | | 1 |
| Guren | 1 | | | | | | | 1 |
| Johanne | | | 1 | 1 | | | 1 | 3 |
| Kristen | 4 | 3 | | | | | | 7 |
| Lisbeth | 2 | | | | 1 | | | 3 |
| Lisbeth Maria | | | | | | 1 | | 1 |
| Magge | | 3 | | | | | | 3 |
| Malene | 5 | 6 | 3 | | 1 | 3 | 1 | 19 |
| Maren | 13 | 7 | 3 | 2 | | 3 | 2 | 30 |
| Maren Kristine | 1 | | | | | | | 1 |
| Maria | 2 | 1 | 1 | 1 | | | | 5 |
| Marianna | | 1 | | | | | | 1 |
| Rachel | | 2 | | 1 | | | | 3 |
| Sara | 2 | | | | | | | 2 |
| Sidsel | 1 | 1 | | 1 | | 1 | | 4 |
| Sigga | 1 | | | | 1 | 1 | | 3 |
| Sophia | | 1 | | | | | | 1 |
| Sophia Hedevig | 1 | | | | | | | 1 |
| at flyta | 71 | 40 | 17 | 21 | 8 | 24 | 9 | 190 |

| | | Sandur | Skálavík | *Húsavíkar sókn* Húsavík | Dalur | Skarvanes | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | flutt | 71 | 40 | 17 | 21 | 8 | 24 | 9 | 190 |
| Sunnevad | | 13 | 8 | 4 | 2 | 3 | 5 | | 35 |
| Susanna | | 1 | 3 | 4 | 2 | | | | 10 |
| Tilsamans | | 85 | 51 | 25 | 25 | 11 | 29 | 9 | 235 |

5. talva: *Mannanøvn í Sandoyar sýslu 1801*

| | | | *Húsavíkar sókn* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Sandur | Skálavík | Húsavík | Dalur | Skarvanes | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
| Anders | | | | | | 1 | | 1 |
| Andreas | 1 | | | | | | | 1 |
| Antonius | | 1 | 2 | 1 | | | | 4 |
| Blasius | 1 | | | | | | | 1 |
| Christian | 1 | | | | | | | 1 |
| Christopher | | | | 2 | | | | 2 |
| Clemen | 3 | 1 | 1 | | | | | 5 |
| Daniel | 3 | 2 | 1 | | 2 | 2 | | 10 |
| David | 2 | | 1 | | | | | 3 |
| Erik | | | | 2 | | 1 | | 3 |
| Gregers | | | 3 | | | | | 3 |
| Gutte | | | 1 | | | | | 1 |
| Guttorm | 1 | | | | 1 | | | 2 |
| Haldan | 1 | | | | | | | 1 |
| Hans | 3 | 7 | 1 | | 1 | 5 | 1 | 18 |
| Henrik | 1 | | | 1 | | 1 | | 3 |
| Jacob | 4 | 3 | 2 | 1 | | 1 | | 11 |
| Jacob Eisenberg | 1 | | | | | | | 1 |
| Jacob Michael | 1 | | | | | | | 1 |
| Jens | 3 | 4 | 1 | | | 1 | | 9 |
| Joen | 16 | 5 | 4 | 1 | 1 | 7 | | 34 |
| Johan Michael | 1 | | | | | | | 1 |
| Johannes | 5 | 3 | 1 | 2 | | 1 | 1 | 13 |
| Lauritz | | | | 1 | | | | 1 |
| Lucas | | 1 | 2 | | | | | 3 |
| Lyder | | 1 | | | | | | 1 |
| Magnus | 1 | 2 | | 1 | | | | 4 |
| Melchior | | 1 | | | | | | 1 |
| Mikkel | 3 | 1 | 1 | | | | | 5 |
| Morthen | 1 | 1 | | 1 | | | | 3 |
| Niclas | 1 | 5 | | 1 | | | | 7 |
| Nicodemus | | 2 | | | | | | 2 |
| Nicolai | | 1 | | | | | | 1 |
| at flyta | 54 | 41 | 21 | 14 | 5 | 20 | 2 | 157 |

| | Sandur | Skálavík | *Húsavíkar sókn* | | | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | Húsavík | Dalur | Skarvanes | | | |
| flutt | 54 | 41 | 21 | 14 | 5 | 20 | 2 | 157 |
| Niels | 1 | | | | | | | 1 |
| Ole | 6 | 4 | 3 | 8 | 1 | 3 | 1 | 26 |
| Peder | 5 | 2 | 2 | | | | | 9 |
| Poul | 5 | 2 | 1 | | | | 1 | 9 |
| Rasmus | 3 | | | 1 | | | | 4 |
| Sakarias | 1 | | | | | | | 1 |
| Samuel | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | | | 6 |
| Simon | 3 | 1 | | | | | | 4 |
| Sivert | | 1 | | | | | | 1 |
| Thomas | 3 | 2 | 1 | | | 5 | | 11 |
| Trond | | 2 | | | | | | 2 |
| Tilsamans | 83 | 56 | 29 | 24 | 7 | 28 | 4 | 231 |

## 6. talva: *Eftirnøvn í Sandoyar sýslu 1801*

| | | | *Húsavíkar sókn* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Sandur | Skálavík | Húsavík | Dalur | Skarvanes | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
| Adams- | 1 | | | 1 | | | | 2 |
| Anders- | | | | | | 1 | | 1 |
| Antonius- | | 1 | 4 | 2 | | | | 7 |
| Augustinus- | 1 | | | | | | | 1 |
| Benedits- | 2 | | | | | | | 2 |
| Blasius- | 2 | 1 | | 1 | | | | 4 |
| Christians- | 1 | 1 | | 1 | | | | 3 |
| Clemens- | 11 | 4 | | | | 1 | | 16 |
| Daniels- | 4 | 2 | 3 | | 1 | 1 | | 11 |
| Davids- | 4 | | 3 | | | | 1 | 8 |
| Diones- | 1 | | | | | | | 1 |
| Eidens- | 1 | | | | | | | 1 |
| Eisenberg | 2 | | | | | | | 2 |
| Eriks- | 2 | 1 | | 2 | | 2 | | 7 |
| Gotfreds- | 1 | | | | | | | 1 |
| Gregers- | | | 5 | 1 | | | | 6 |
| Guttes- | 1 | | 2 | | 1 | | | 4 |
| Guttorms- | 1 | | | | 3 | | | 4 |
| Hans- | 10 | 11 | 1 | 3 | 1 | 13 | 2 | 41 |
| Hansen Koyte | 1 | | | | | | | 1 |
| Henriks- | 4 | | | 1 | | | | 5 |
| Hentze | 8 | | | | | | | 8 |
| Hermands- | | | 1 | | | | | 1 |
| Jacobs- | 2 | 8 | 6 | 1 | | | | 17 |
| Jens- | 4 | 3 | | | | 1 | | 8 |
| Jensen Arge | | 1 | | | | | | 1 |
| Joens- | 31 | 14 | 4 | 3 | 4 | 17 | | 73 |
| Joensen Høy | 1 | | | | | | | 1 |
| Johannes- | 4 | 12 | | 6 | | 3 | | 25 |
| Justinus- | 1 | | | | | | | 1 |
| Lauritz- | | | | 1 | | | | 1 |
| Lucas- | | 1 | 6 | | | | 1 | 8 |
| Lyders- | | 1 | | | | | | 1 |
| at flyta | 101 | 61 | 35 | 23 | 10 | 39 | 4 | 273 |

| | Sandur | Skálavík | *Húsavíkar sókn* Húsavík | Dalur | Skarvanes | Skúvoy | Dímun | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| flutt | 101 | 61 | 35 | 23 | 10 | 39 | 4 | 273 |
| Magnus- | 5 | 2 | 1 | 5 | | | | 13 |
| Mikkels- | 13 | 2 | | 4 | | 2 | 5 | 26 |
| Morthens- | 9 | 1 | | | | | | 10 |
| Niclas- | | 3 | | | | | | 3 |
| Nicodemus- | | 2 | | 1 | | | | 3 |
| Nicolai- | | 3 | | | | | | 3 |
| Niels- | | | 1 | | 1 | | | 2 |
| Oles- | 6 | 10 | 6 | 13 | 3 | 5 | | 43 |
| Peders- | 7 | 5 | 3 | | | | | 15 |
| Philippus- | | | | | 1 | | | 1 |
| Pouls- | 10 | 1 | 1 | | 1 | | 2 | 15 |
| Rasmus- | 5 | | | 1 | | | | 6 |
| Sakarias- | 3 | | | | | | | 3 |
| Samuels- | | 5 | 2 | 2 | 1 | | | 10 |
| Simons- | 2 | 1 | 2 | | 1 | 1 | 1 | 8 |
| Siverts- | | 4 | | | | | | 4 |
| Sørens- | | | | | | 1 | | 1 |
| Thomas- | 7 | 2 | 3 | | | 7 | 1 | 20 |
| Trond(e)s | | 5 | | | | 2 | | 7 |
| Tilsamans | 168 | 107 | 54 | 49 | 18 | 57 | 13 | 466 |